## VIÐMERKINGAR

# Misskiljing ella manipulatión

**Kári Mortensen,**
*lærari í studentaskúlanum í Hoydølum*



Útvarpið bar mikukvøldið tey tíðindi, at Landsstýrið hevur givið Mentamálaráðnum boð um at fyrireika umfatandi broytingar í miðnámsútbúgvingunum.

Nú veit eg ikki, um útvarpið hevur gjørt sær ómak at bera tíðindini rætt - tað vil siga, um tað passar, at Landsstýrið grundað á danska gymnasiereformin heldur tíðina vera búna til ta heilt stóru fusiónina av miðnámsútbúgvingunum í skúladepil í Marknagili.

Fryktandi er tó fyri, at tíðindini eru røtt. Vit vita jú, at sterkar kreftir í politisku skipanini arbeiða fyri einum skúladepli í Marknagili. Og pínligt er tað, um politikkarar og embætisfólk í síni ivrigheit eftir at fáa gongd á aftur hálvavegna steðgaða projektið í Marknagili við vilja ella óvitandi misbrúka danska gymnasiereformin í eini "hensigten helliger midlet" herferð.

Niðanfyri standa nøkur brot um danska reformin, sum eru tikin úr Uddannelsesguiden.dk " Reform af de gymnasiale uddannelser"

Í Danmark er altso framvegis talan um 4 ymiskar útbúgvingar við 4 ymiskum hálvárs innleiðsluskeiðum. Eitt skifti millum útbúgvingarnar er bara ætlað teimum, sum eftir eitt hálvt ár halda seg hava valt skeivt og ynskja at skifta útbúgving. Haraftrat hevur næmingur, sum skiftir útbúgving sjálv/ur ábyrgd av at innheinta tað írestandi í nýggju útbúgvingini.

Eg vil við hesum staðiliga vísa á, at nýggja danska skipanin als ikki leggur upp til fusiónir av miðnámsútbúgvingum, sum summi við nógvum valdi kundu hugsað sær.

Pláss er ikki her at fara longur inn í tjakið um broytingar í miðnámsútbúgvingunum. Stutt kann sigast, at vit vita øll, at okkara miðnámsútbúgvingar (og ikki minst studentaskúlin) eru tætt knýttar at donsku útbúgvingunum. Tað er skilagott framvegis at hava hetta tilknýti, eisini at gera broytingar samsvarandi donskum broytingum og samstundis at gera broytingar á teimum økjunum, sum serliga viðvíkja okkara egnu viðurskiftum.

Kanska hava vit sum fakfólk ikki verið nóg góð at greiða frá okkara sjónarmiðum. Men boðskapurin hesuferð er: Verið varðin við bygnaðarbroytingum, blandið ikki orðini bygningur og bygnaður saman. Hyggið væl at verðandi miðnámsútbúgvingum og serliga teimum kvalitetum, tær hava hvør sær.

# Aðrir bollar á suppuna



*Í seinastu viku var seminar í Hotel Føroyum undir heitinum, "At økja um kvinnurnar lut í politisku avgerðarprosessini". Tað eru londini í útnorði, Føroyar, Ísland og Grønland, sum hava tikið seg saman um hetta slagi av seminari, sum er ætlað kvinnuligum tinglimum í øllum trimum londunum. Men av tí, at bert tveir av politisku flokkunum á Føroya Løgtingi hava kvinnuliga umboðan, vóru flokkarnir noyddir at fara útum tingi eftir luttakarum*

**Eg eri sannførd um, at tað er ein bági fyri Føroyar, at so fáar kvinnur eru við at taka tær avgerðir, ið verða tiknar í politikki**

VIÐMERKING
*Rúna Sivertsen*

Okkara samfelag hevur ongatíð fyrr verið so lógarásett, sum tað er í dag, Nærum alt lívið, frá vøggu í grøv, er skipað við lógum og reglugerðum. Men av eini ella aðrari orsøk, eru fáar kvinnur, sum ynskja at verða við í tí politiska liðnum, har avgerðirnar verða tiknar. Í hvussu er, er lutfalli millum menn og kvinnur á vallistunum ógvuliga misjavnt.

Tá munurin millum menn og kvinnur á listunum er so stórur, er heldur ikki undarligt, at kynjabýtið á tingi verður misjavnt. Tí er neyðugt, at fleiri kvinnur vilja stilla upp til løgtingsvalini!

Og rekruttering var júst eitt eitt av evnunum, sum varð tikið upp á kvinnuseminarinum, sum varð hildið á Hotel Føroyum í seinastu viku undir heitinum, "At økja um kvinnurnar lut í politisku avgerðarprosessini".

Tað eru londini í útnorði, Føroyar, Ísland og Grønland, sum hava tikið seg saman um hetta slagi av seminari, sum er ætlað kvinnuligum tinglimum í øllum trimum londunum. Men av tí, at bert tveir av politisku flokkunum á Føroya Løgtingi hava kvinnuliga umboðan, vóru flokkarnir noyddir at fara útum tingi eftir luttakarum. Fert tú á gátt á Føroya Løgtingi, sært tú eina "primitiva forsamling", skilt á tann hátt, at har eru næstan bara tingmenn og landsstýrismenn. Bert tríggjar kvinnur eru við at lóggeva fyri og stýra teimum viðurskiftum, sum tú, eg og okkara børn liva undir.

Tær kvinnur, ið hava áhuga og kundu hugsað sær at luttikið í politikki, gera skeivt í ikki at lata seg stilla upp til val. Vit hava øll fingið ymisk evni í gávu frá skaparans hond - og evnini at luttaka har avgerðirnar verða tiknar eru givnar summum av okkum, bæði kvinnum og monnum. Tað var ongantíð ætlanin, at mennirnir einsamallir skuldu sita við allari ábyrgdini. Men tað er léttari at lata mennirnar um tær tungu avgerðirnar - og so kunnu kvinnurnar sita á síðulinjuni og grenja um, hvussu illa mennirnir duga at stýra samfelagnum.

Í øllum lívsins viðurskiftum gongur best, tá maður og kvinna arbeiða saman, og tað sigur seg sjálvt, at skulu vit fáa best møgulig úrslit, er neyðugt at kvinnurnar eisini eru við at taka avgerðirnar.

Vit, sum fingu høvi at luttaka á seminarinum fingu nógv burturúr, og ætla okkum ikki at liggja á løtu síðuni, men at gera okkara til, at kvinnur í øllum Føroyum gerast tilvitagar um, hvussu neyðugt tað er, at kvinnur eru við í politisku støðutakanini.

Hetta var fyrsta seminarið av sínum slagi í útnorði. Framyvir verða seminar hildin fyri kvinnuligar tinglimir í útnorðurlondum annaðhvørt ár, næstu ferð í Grønlandi í 2006.

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Kirsten Mørup Jeppesen:

## Spor í Smiðjuni

**Hósdagin 2. september kl. 14.00 læt Kirsten Mørup Jeppesen upp framsýningina »Spor« í Smiðjuni í Lítluvík í Havn**

Kirsten, ið er 60 ára gomul, hevur málað seinastu 10 árini, fyrst vóru tað mest alvarellir, men seinnu árini hevur hon bert málað oljumálningar.

Fyri einum ári síðan hevði hon eisini eina framsýning í Smiðjuni, tá vóru myndaevnini føroysk, men hesaferð er talan um eina heilt annarleiðis framsýning, sum hevur fingið heitið »Spor«.

Kirsten er hálvføroysk, mamman er føroysk, Alma, dóttir Hans Nielsen, úr Kvívík, sum arbeiddi sum timburmaður.

51 oljumálningar eru á framsýningini sum verður opin til og við týsdagin 7. september, allar dagar frá kl. 14.00 – 20.00.



*Kirsten Mørup Jeppesen hevur framýningina »Spor« í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Tøkk

Vit vilja hervið hjartaliga takka øllum fyri sýnda samkenslu í stóru sorg okkara, tá elskaði sonur, beiggi, systirsonur, ommu- og abbasonur okkara

**Eywind Dalsgaard Henriksen**
f. 4.11.83 – d. 13.8.04

doyði og varð jarðaður.

Stóra tøkk fyri pening, sum kom inn ístaðin fyri blómur og kransar, ið allur verður latin til Rådet for større færdselssikkerhed i Ribe Amt.

**Jenny, Hallur, Amanda Maria, Winnie, Eystein, Aðalstein við familju og Tórhild við familju**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá pápi, verpápi og abbi okkara

**Jacob Peter Petersen**
Porkeri

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, ið á ymsan hátt vóru um hann bæði heima og á sjúkrahúsinum.
Tøkk fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, kirkjuni og ervinum.
Tøkk til kirkjutænarar og øllum tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðina og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Føroya Felag ímóti Krabbameini og til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum.

*Fyri tey avvarðandi*

**Olga, Jónbjørg og Petur Martin**

## Dagurin

**3. september. Seraphia.** Kristin trælkvinna úr Sýriulandi, sum varð hálshøgd fyri trúar sakir.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:........................................
Bústaður:........................................
Bygd/býur:..............................Tel:..................
Evt. arbeiðspláss:........................................

Merkisdagurin er: ........................................

Innsendari: ..............................Tel:..................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 34 18 00/21 61 35, fax 34 18 01, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 45 86 86, fax 45 86 87, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 44 78 20, fax 44 95 20, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 37 53 64, fax 37 54 64, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 33 38 20, fax 33 37 20, teldupost: edvard@sosialurin.fo

Lesið Sosialin
veitst tú ikki tað? Sosialurin
Internet
Sosialurin www.sosialurin.fo
-tað loysir seg!